gult14 cyan14 magenta14 svart14

# Bilar

Nr. 126 • hósdagur • 5. juli 2001 • 75. árg.

## Suzuki Liana 1.6

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.6 litur 4 syl. 16V 103 hk |
| Bensinnýtsla | 14,1 km/l |
| Dekkstødd | 185/65-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 423.0 cm |
| Breidd | 169.0 cm |
| Hædd | 154.5 cm |
| Eginvekt | 1125 kg |
| Totalvekt | 1650 kg |
| Viðførisrúm | 300 litrar |
| Prísur | kr. 159.000,- (Liane 1,3 kostar kr. 149.000,-) |
| Søluumboð | Eyðbjørn Hansen<br>Varðagøta 75<br>FO-100 Tórshavn<br>Tlf.313375 |

# Liana - rúmligur familjubilur frá Suzuki




*Liana er ein rúmligur familjubilur við fimm hurðum*



*Instrumentborðið er ikki heilt vanligt, vísaranir eru digitalir og lættir at avlesa*

**Suzuki, ið eru kendir fyri at gera smáar og orkusparandi jeepar og persónbilar, koma nú á markanðin við nýggja familjubilinum Liana, sum longu er komin út til bilhandlararnar, hóast bilurin ikki kemur alment fram fyrr enn í august**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Liana er ein rúmligur familjubilur við fimm hurðum, og góðum plássi til tey ferðandi og viðføri teirra. Viðførisrumið er 300 litrar, og 1.062 litrar við baksetrunum niðri. Undirvognurin er bygdur upp við óbundnari Mc Pherson fjaðraskipan aftan og framman, sum gevur bilinum sera góðar koyrieginleikar.

### Digital instrumentir

Instrumentborðið er ikki heilt vanligt, vísaranir eru digitalir og lættir at avlesa. Tað at baksetrini eru ca. 5 sentimetrar hægri enn tey fremru, ger at tey sum sita aftan, sita høgt og hava gott útsýni frameftir. Uppeftir er nok av plássi. Liana verður gjørdur við tveimum motorstøddum, einum heilt nýggjum 1.3 litur við 90 hk, og einum 1.6 litur við 103 hk. Báðir hava teir dupultar yvirliggjandi knastakslar og 16 ventilar.

### Útgerð

Bilurin er væl útgjørdur við nógvari trygdarútgerð so sum ABS bremsum, airbag báðumegin framman og í síðunum, fýra nakkapútur sum kunnu stillast, start og tjóvarísikring, el-síðurútar í øllum fýra hurðunum, el-spegl, sentrallás, varma í framsetrinum og førarasetrið kann stillast í hædd.




*Viðførisrumið er 300 litrar, og 1.062 litrar við baksetrunum niðri*

### Fleir nýggir á veg

Umframt Liana kemur eisini Suzuki Ignis á marknaðin í Danmark í hesum døgum, hann fæst bæði við tvey og fýrahjólstrekk. Suzuki stendur fyri søluni av triðinginum av øllum fýrahjólsdrivnu bilunum í Danmark. Í heyst kemur tann største Suzuki nakrantíð, ein 7 persóna Grand Vitara við 2.7 litur V6 24V motori. Seinni kemur hann sum diesel.

gult15 cyan15 magenta15 svart15



ÚT AT KOYRA

# Fleiri heiðurslønir til BMW motorar




*Her er nýggi sølumaðurin hjá Bilfríðkan, Jákup Olsen úr Saltnesi, við einum BMW Compact, við nýggjastu framkomnu Valvetronic tøknifrøðini. Bilurin hevur 116 hk og kostar kr.226.000,-*

**Motorarnir frá Bayerische Motor Werke (BMW), eru millum teir mest framkomnu í heiminum, meina heimsins leiðandi motorserfrøðingar. Í kappingini "International Engine of the Year Award" hevur BMW fingið heilar fimm av 12 virðislønum, har ímillum tann nógv umhildna "Overall winner"**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

BMW er tað bilmerki, ið hevur vunnið mest í kappingini "International Engine of the Year Award", síðan kappingin byrjaði fyri nøkrum árum síðan. Í dómsnevndini eru 38 altjóða góðkendir motorserfrøðingar úr 17 ymiskum londum. Tann 6-syl. BMW M3-motorurin uppá 3.2 litur við 343 hk, og einum snúningsmomenti uppá 365, vann heilar trýggjar virðislønir, har ímillum eisini "Overall winner" virðislønina.

### Valvetronic

BMW motorarnir hava klára seg sera væl yvir fyri dómsnevndini. Motorarnir verða flokkaðir alt eftri hvussu væl teir krafta, bensinøkonomi og hvussu framkomnir og smartir teir eru. Tann nýggja Valvetronic tøknifrøðin, sum ger tann vanliga karburatorin óneyðugan, bleiv útnevnd til at vera ein kollveltandi nýskapan. Valvetronic skipanin minkar munandi um bensinnýtsluna, samstundis sum kraftin verður betri. Eisini er Valvetronic skipanin eitt gott íkast til at náa teimum framsøknu málunum at minka um luftdálkingina.

*Kelda: BMW Import A/S*

# BMW X3 í 2004




*Bilurin á myndini er ein prototypa av BMW X3, sum eftir ætlan skal koma á marknaðin í 2004. BMW hevur samráðingar við Steyr Puch um framleiðslu av bilinum*

**Eftir at BMW X5 blivu sera væl móttiknir, er avgerð tikin um at ein X3 skal koma á marknaðin í 2004.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Samráðingar eru millum BMW og Steyr Puch í Eysturríki, um at framleiða ein nýggjan BMW X3, sum eftir ætlan skal verða klárur í 2004. Bilurin er hægri og rúmligari enn BMW 300-røðin. X3 verður bygdur yvir BMW 330iX, ið hevur ein 3.0 litur 24V motor við 230 hk. Tað at bilurin verður ein 4X4, gongur á ongan hátt út yvir koyrieginleikarnar sum vera á sera høgum støði.

*Kelda: FDM / Motor*

## Accord aftur í Japan



Núverandi Honda Accord verða gjørdir í Swindon í Onglandi. Tá nýtt modell kemur í 2003, verða teir aftur gjørdir í Japan, samstundis sum teir koma við einum nýggjum 2.0 dieselmotori.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Kia Magentis



Kia kemur nú á europeiska marknaðin við tí nýggja stóra Magentis, sum avloysir Kia Klarus. Bilurin, ið er sera væl útgjørdur, fæst m.a. við 2.5 litur V6 motori og 169 hk.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nissan brintbilar



Í løtuni verður nýggi fýrahjólstrekkjarin hjá Nissan, Xterra, við brennievnikyknum, testaður í Kalifornien. Bilurin verður drivin av brint og lithium battaríum.

*Kelda: Motor Magasinet*